# HSV vil ikki av við liðskiparan

Hollendski landsliðsleikarin og liðskiparin hjá Hamburger SV, Rafael van der Vaart, hevur leingi havt ætlanir um at skifta til eitt størri felag. Í summar bleiv hann enn tá fotograferaður í eini Valencia-troyggja við vón um at felagið so vildi lata hann fara, men tað gjørdu teir ikki. HSV vil fegið hava van der Vaart at vera í felagnum so leingi, sum til ber. Van der Vaart hevur sáttmála til summarið 2010, men felagið ætlar at leingja um sáttmálan. – Vit vilja fegin hava Rafael her í nógv ár, og tí arbeiða vit við at leingja um sáttmálan, sigur venjarin, Bernd Hoffmann, við týska blaðið Kicker.




# AaB brúkar høvdið best

Hagtøl verða førd yvir næstan alt í ítróttarheiminum nú á døgum, og fyrr í dag kundi danska heimasíðan bold.dk siga frá, at felagið hjá Súna Olsen og Jón Róa Jacobsen, AaB, hevði fingið flest mál við høvdinum í ársins SAS-liga-kapping. AaB hevur fingið heili 11 mál við høvdinum, meðan næsta liðið á listanum er Esbjerg, sum bert hevur skorað seks ferðir við høvdinum. Tann spælarin, sum oftast hevur skallað bóltin í málið, er Jeppe Curth hjá AaB við fimm ferðum, meðan álopsmakkarin hjá honum, Rade Prica, hevur skallað í málið tríggjar ferðir.

# uðuroy



*Formaðurin í TB avgreiður sína atkvøðu, sum tann fyrsti hetta kvøldið*



*Í VB/Sumba ynskja tey samstarv og eru fús at endurupptaka samstarv við TB í framtíðini.*

Hetta er eisini mest nýtti leisturin í fótbóltsfeløgum kring allan heimin.

### Stórt vónbrot

Royn, VB og Sumba fara nú at kanna møguleikarnar fyri at skipa ætlaða samstarvið, hóast TB ikki er við.

Eykaaðalfundur í Royn gav í gjárkvøldið einmælt nevndini heimild at samráðast við VB og Sumba um at skipa samtakið.

Í Royn verður helst lagt upp til, at hetta skal fevna um allan fótbólt, eisini allar tær yngru deildirnar.

Bæði í Vági og í Hvalba var greiður meiriluti fyri samstarvi millum feløgini í oynni, tað vóru ávíkavist 90% og 100% á støðunum báðum.

Í Vági og úr Hvalba hoyrist, at tey eru sera vónbrotin av, at Tvøráfólk skuldu vraka uppskotið um samstarv, og úttala nevndarlimur úr Royn og Formaðurin í VB seg eisini um málið.

Bjarni Johansen Formaður í VB sigur, at hann metir tað vera rættiliga keðiligt, at samstarvsuppskotið skuldi fella á Tvøroyri. Hann sigur víðari at VB/Sumba má bara góðtaka úrslitið og koma víðari við samstarvi við Royn.

Hann vil tó ikki útiloka einum samstarvi í framtíðini.

– Tað má tíðin vísa. Vit eru fúsir, um so er, sigur ein vónbrotin VB Formaður, og hann leggur afturat at dyrnar eru ikki læstar, tær standa á gloppi.

Karin Eið Jensen, stjórnarlimur í Royn sigur seg eisini vera rættiliga vónbrotna av, at TB skuldi siga nei. Hon heldur, at tað hevði verið betur um TB hevði verið við eisini.

- Hetta er øgiliga keðiligt, tí uppskotið var ikki um at niðurleggja TB, VB, Royn og Sumba.

Talan var um at samstarva í bestu deildini, sigur ein avgjørd Karin, sum leggur afturat, at samstarvssamráðingar halda áfram millum hini feløgini í oynni, uttan um TB.

# Vøllurin í sera góðum standi

**Bæði vallarvørðurin á Tórsvølli og landsliðsvenjarin halda, at umstøðurnar at spæla fótbólt vera góður leygardagin, tí sjálvur vøllurin er í sera góðum standi**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Føroysku landsliðsspælararnir vandu fyrr í morgun á ovara vølli í Gundadali. Lagið í hópinum tykist vera rættiliga gott, og allir spælararnir hava tikið lut í venjingini í morgun.

Onkrir smásnuddir eru sjálvandi í hópinum, og m. a. fór ein av spælarunum at bløða í nøsini eftir ein hendiligan samanstoyt. Hetta var tó ikki nakað álvarsligt, og tí sær út til, at landsliðsvenjarin hevur allar spælararnar tøkar til leygardagin.

Annars hevur eisini nógv verið tosað um, hvussu standurin á sjálvum vøllinum fer at vera hesa ársins tíð, og her tykist bæði vallarvørðurin og landsliðsvenjarin at vera samdir.

Jógvan Martin Olsen heldur ikki, at hann nakrantíð hevur sæð vøllin í so góðum standi, meðan vallarvørðurin, Jens Ingolf Poulsen er samdur. Tí vera umstøðurnar at spæla fótbólt á Tórsvølli leygardagin helst sera góðar.a

